# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*Vit eita Marianna og Hilma. Tann 26. mai fingu vit eina diddu og ein beiggja. Diddan var 50 cm long og vigaði 3125 gr, beiggin var 51 cm langur og vigaði 2700 gr. Mamma og babba eita Unn og Finnbjørn Simonsen, Kaldbak.*

18. mai fingu Christina Danberg, Tórshavn, og Tróndur Ravnsfjall, Miðvági, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3850 gr.

20. mai fingu Beinta Dam og Claus Thomsen eina dóttur. Hon var 46 cm long og vigaði 2220 gr. Tey búgva í Christiansfeld.

21. mai fingu Anja Haraldsen og John Gudmundsen, Sørvági, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3550 gr.

21. mai fingu Beinta D. og Niels E. Ennigarð, Oyrarbakka, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4050 gr.

22. mai fingu Miriann og Annfinn Fagraklett, Norðragøtu, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4500 gr.

22. mai fingu Maria Vinther og Niels Jacob Eysturberg, Vági, ein son. Hann var 52 cm lang og vigaði 3350 gr.

23. mai fingu Súsanna Gaard og Ólavur Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3150 gr.

24. mai fingu Sólfríð Lognberg og Bjarki Henriksen, Sandi, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3300 gr.

25. mai fingu Frida og Símun Poulsen, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3750 gr.

25. mai fingu Bina Jógvansdóttir og Kári Gullfoss, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3400 gr.

26. mai fingu Kristina og Ronnie Háfoss, Hoyvík, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 3950 gr.

27. mai fingu Anna J. og Rasmus Frederiksberg, Strondum, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4250 gr.

27. mai fingu Nanny Ritter og Poul Falkvard, Sørvági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4200 gr.



## Tøkk

Eg takki hjartaliga øllum, ið gleddu meg á konfirmatiónsdegi mínum tann 4. apríl 2004.

Heilsan

*Beinta Rasmussen*

## Øssur Johannesen í Smiðjuni



*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í hesum døgum hevur Øssur Johannesen listamaður framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Talan er um eina annarleiðis og litfagra framsýning, sum lýsir líðing, sálarpínu og krossfesting. Á framsýningini eru bæði málningar og tekningar.

Framsýningin er opin til 2. juni.

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya:

## 18 sjúkrarøktarfrøðingar fingið prógv



*Mikudagin 26. mai fingu 18 sjúkrarøktarfrøðingar prógv á Sjúkrøktarfrøðiskúla Føroya. Prógvini vórðu handaði á samkomu í Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum.*
*Aftara rað f.v. Ingibjørg Abrahamsen, Tórun P. Borentzvige, Bárða Eyðbjørg Brandsdóttir, Maibritt Wolles Djurhuus, Borghild á Fløghamri, Diana M. Hansen, Paula Jacobs, Aslaug Joensen, Dóra D. Johansen.*
*Fremra rað f.v. Elsa Lamhauge, Inga Magnussen, Regina M. Midjord, Jana Mortensen, Súsanna Olsen, Guðni Remberg, Ása Malan Samuelsen, Annika Strøm.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Dagurin

**29. mai. Maximinus**, deyður í 352. Biskupur í Trier í Fraklandi. Á ferð til Miklagarðs at royna semju í kirkjuligum stríði doyði hann.

**30. mai. Vigand**. Helst tann sami sum hin heilagi Venantius úr Arles í Suðurfraklandi, sum var av heidnari ætt, men gjørdist kristin. Doyði umleið ár 400 á ferð í Eysturlond.
*Rasmus Effersøe varð føddur hendan dagin í 1857.*

**31. mai. Petronella**, deyð umleið ár 100. Ein kend halgikona í fornkirkjuni. Halgisøgan sigur, at hon var dóttir Pætur ápostul, men tað skal helst skiljast sum andaliga dóttir hansara.

**1. juni. Nikomedes**, deyður umleið ár 300. Rómverskur borgari ið gjørdist kristin og tí varð tikin av døgum.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Asta Jacobsen, Sørvágur:

## 25 ára starvsdag í Føroya Banka



Fríggjadagin 28. mai hevði Asta Jacobsen í Sørvági 25 ára starvsdag í Føroya Banka.

Asta er 46 ára gomul og úr Sørvági. Hon byrjaði sum bankalærlingur í Sjóvinnubankanum í Sørvági 28. mai 1979, lærutíðin var fýra ár.

Í 1983 var hon útbúgvin bankakvinna, og arbeiðir hon við øllum vanligum bankaarbeiði og við kundaráðgeving.

Í 1994 varð Sjóvinnubankin lagdur saman við Føroya Banka.

Asta var virkin í fakfelagnum hjá bankanum og var álitiskvinna í fleiri ár. Hon hevur eisini sitið í nevndini í starvsfólkafelagnum SFF.

Frítíðina brúkar Asta í urtagarðinum heima við hús, og henni dámar væl at ganga túrar í náttúruni.

Asta er dóttir Mary og Tóra Skaalum í Sørvági.

Hon er gift við Eivin H. Jacobsen úr Sørvági, og tey eiga trý børn: Inga 27 ár, Marit 19 ár, og Terji 14 ár.

Hansina Larsen, Tórshavn:

## Sitið vakt í 40 ár á Føroya Læraraskúla



*Pauli Nielsen rektari á Føroya Læraraskúla takkar Hansinu Larsen fyri langa og trúgva tænastu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hósdagin 27. mai var seinastu ferð at Hansina Larsen í Havn sat vakt við próvtøkurnar á Føroya Læraraskúla.

Hansina er ættað úr Kvívík og verður skjótt 80 ár. Hon byrjaði í 1965 at sita vakt á Føroya Læraraskúla. Tá helt skúlin til í gamla komunuskúlanum í Vaglinum í Havn, har sum býráðið er í dag.

Hetta tíðarskeiðið hevur Føroya Læraraskúli havt fimm stjórar. Tá hon byrjaði, var Tummas Nygaard stjóri, síðan var tað Martin Holm, Bjarni Niclasen, Andreas Højgaard og Pauli Nielsen, sum í dag er rektari á skúlanum.

Seinnu árini hevur Hansina skipað fyri vaktunum og skaffað fólkini sum sita vakt. Vanliga sita trý fólk vakt undir próvtøkunum.

Listasavn Føroya:

## Inger Smærup Sørensen listarligur leiðari

Listasavn Føroya hevur sett 27 ára gomlu Inger Smærup Sørensen í starv sum listarligur leiðari frá 1. august 2004.

Inger Smærup Sørensen er cand. mag í listasøgu, og í dag starvast hon sum listarligur leiðari á Heerup Museum í Keypmannahavn



*Inger Smærup Sørensen verður frá 1. august 2004 listarligur leiðari á Listasavni Føroya*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Andlát

20. mai
Albert Mortensen, Argir,andaðist í London, 55 ár.
Paula Krúnufjall, ættað av Norðtoftum búsitandi í Klaksvík, 67 ár.
21. mai
Kim Freyser Jacobsen, Klaksvík, 42 ár.
22. mai
Ragnhild Djurhuus, ættað úr Sumba, búsitandi í Reykjavík, 80 ár.
23. mai
Mathea Olsen, fødd Højgaard, Toftir, 71 ár.
Henry Ziska, Klaksvík, 83 ár.
24. mai
Jaspur viá Garð, ættaður úr Klaksvík búsitandi í Kollafirpi, 65 ár.
Jákup Berg, Tórshavn, 76 ár.
Hjørleif Johansen, ættaður úr Miðvági búsitandi í Hovi, 71 ár
25. mai
Astrid Eliasen á Bakkanum í Fuglafirði, 92 ár.
26. mai
Michala Hjelm, Vágur, 84 ár.
Frida í Dali, Tórshavn, 94 ár.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá

**Karin Isaksen**
Norðragøtu

doyði og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og minnisgávur til nýggja sambýlið í Gøtu.
Tøkk til tykkum, sum fylgdu henni til gravar.
Eisini ein tøkk til starvsfólkið á B6 og B7.

**Systkini**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá ið góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Súsanna Joensen**
Tórshavn

doyði og varð jarðað.

*Familjunnar vegna*
**Páll, Jógvan, Eyðgerð, Margret og Annika**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu okkum og sýndu tykkara samkenslu, tá kæri maður, pápi, sonur og bróður okkara

**Hans Olaf Johannessen**
Klaksvík

andaðist 1. mars og fór til gravar úr Christianskirkjuni tann 5. mars.

*Familjunnar vegna*
**Jóna, Katrin og John**